# Búðu væl á Mayfair

Føroysku tíðindafólkini búðu væl á Mayfair hotellinum í Helgolandsgade, meðan Vestnorden Travel Mart var á Scandic Copenhagen, ið liggur tætt við. Tað tók einar 5 minuttir at ganga ímillum, so plaseringin var rættiliga høglig í so máta. Bæði hotellini høvdu gott netsamband, sum eisini var ókeypis. Tá vit komu á Mayfair og beinanvegin spurdu um net, fingu vit kotu við passorði og loyniorði, og tá vit spurdu um kostnað, var svarið, at "netsambandið kostar einki…" So, hetta eru góðar umstøður hjá teimum, ið brúka net í sínum arbeiði.





# Hugni er eisini á ferðavinnustevnu

TRAVEL MART

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Uppí eina ferðavinnustevnu, sum Vestnorden Travel Mart, hoyrir eisini eitt seminar, sum var mikumorgunin í síðstu viku, áðrenn sjálv stevnan byrjaði klokkan 14 hendan dagin og vardi til klokkan 17 dagin eftir.

Mikukvøldið varð eisini skipað fyri get-together-tiltaki, og tá varð eisini farið út á sjógvarnir í Keypmannahavn at sigla í bátum.

Veðrið var so avbera gott – heilt frá tí, at vit komu til Keypmannahavnar seint týsdagin, til vit vendu heimaftur fríggjadagin beint eftir middag.

Tað var stilt í veðrinum. Sólin bakaði, og tað var lýtt.

Hóskvøldið, tá ferðavinnustevnan var liðug, var eisini skipað fyri stórum galla-døgurða, har Grønland sum vertland setti sín dám á við eitt nú sangi og nationalum búnum.

Her eru nakrar myndir, sum Sámal Bláhamar tók á túrinum, tá siglt varð á sjógvunum í Keypmannahavn.









## FAKTA

Umboðini í NATA-samstarvinum, sum er undirskrivað millum Føroyar, Ísland og Grønland í 2006, eru:
Per Hansen, Hans Joensen og Maria á Lofti (Føroyar). Óløf Yrr Atladóttir, Áslaug Alfredsdóttir og Gunnar Siguðsson (Ísland). Bjarne Eklund, Kenneth Høegh og Anders Stenbakken (Grønland).

